35. grein: **Søla og rán av børnum** Samfelagið hevur skyldu til at nýta øll ráð at forða sølu av børnum og barnaráni	**17. grein:** **Týdningur av fjølmiðlum** Samfelagið hevur skyldu at tryggja børnunum atgongd til upplýsingar frá hóskandi nøgd av innlendis og altjóða tíðindamiðlum.	**24. grein:** **Heilsa** Børn hava rætt til heilsu og eiga at fáa læknahjálp við serligum atliti at fyribyrgjandi heilsurøkt. Samfelagið hevur skyldu at minka um tilburðir av barnadeyða og at virka fyri, at gamlir siðir, ið kunnu skaða heilsu barnanna, verða avlagdir.
20. grein: **Foreldraleys børn** Samfelagið hevur serliga skyldu at verja børn, sum hava mist foreldur og familju og at tryggja teimum aðra røkt og, um tað krevst, ættleiðing.	**31. grein:** **Frítíð og hvíld** Børn hava rætt til frítíð, hvíld og spæl og at taka lut í mentanarligum og skapandi virksemi.	**6. grein:** **Rætturin til lívið** Barnsins rættur til lívið og skylda samfelagsins at tryggja børnunum undankomu og menning.

38. grein: **Vápnað stríð** Samfelagið hevur skyldu at halda altjóða avtalur um krígsførslu, eitt nú at tryggja at børn undir 15 ára aldur ikki taka lut í bardaga og at avmarka útskrivingn av 15-18 ára gomlum til vápnaða tænastu. Í Vápnaðum stríði hava øll børn rætt til verju og røkt.	**12. grein:** **Rættur at siga sína hugsan** Børn hava rætt at siga sína hugsan og krav um, at hugsan teirra verður virð.	**26. grein:** **Almannatrygd** Børn hava rætt til almannatrygd.
15. grein: **Rættur at stovna feløg** Børn hava rætt at gerast limir í feløgum og vera við at stovna feløg, tó uttan at gera seg inn á annara rættindi.	**30. grein:** **Minnilutar** Børn, ið hoyra til minnilutabólkar, hava rætt til at liva samsvarandi teirra egnu mentan og átrúnaði og at tala sítt egna mál.	**19. grein:** **Verja móti ringari viðferð** Samfelagið hevur skyldu at verja barnið móti allari ringari viðferð frá foreldrum ella øðrum, at fyribyrgja allari ringari viðferð og at bøta um fylgjurnar av tílíkari viðferð.